# Frálík vitjan

**Fyrsta ferðin til Suðuroynna var hæddarpunktið við vitjanini í Føroyum, heldur forsætisráðharrin**

VITJAN
*Heri á Rógvi*

Vitjanin hjá forsætisráðharrahjúnunum í Føroyum varð nógv merkt av tí føroyska veðurlagnum. Mjørki gjørdi, at flogfarið, tey vóru við, ikki fekk sett seg í Vágum. Nakrar tímar sveimandi yvir flogvøllin í Vágum og eina stutta vitjan í Bergen seinni, lendi Anders Fogh og frú Anne-Metta Rasmussen seint mikukvøldið.

Skráin við tí nógva góða matinum varð avlýst mikudagin, men hósdagurin fekk eitt innihald.

– Eg havi upplivað hetta sum eina frálíka vitjan. Vit høvdu eitt sindur av trupulleikum við at lenda fyrsta dagin, men vit komu so sanniliga fyri okkum aftur í góðveðrinum í Suðuroy.

Sjálvur havi eg ongantíð vitjað í Suðuroynni, men eg havi hoyrt nógv um oynna. Móttøkan kendist ótrúliga væl, og eg eri ógvuliga glaður fyri at hava upplivað oynna og fólkið, sigur Anders Fogh Rasmussen, sum sigur seg bara vera ernan av, at Suðuroyggin verður rópt fyri lítla Danmark.

### Góður tóni

Ikki bara veðrið og blíðskapurin í Suðuroynni var sermerkt við vitjanini hjá Anders Fogh og fylgi – eisini tónin millum danskar og føroyskar myndugleikar er vorðin betri.

– Hyggja vit eftir vitjanini sum eina heild, so er tað deiligt at uppliva, at sambandið millum Føroyar og Danmark er vorðið so gott, sum tað er nú. Eg merki týðuliga, tá eg hitti føroyingar eins politikarar, at vit hava sett hol á eini positiva gongd fyri báðar partar. Nú er tað so upp til tykkum sjálvi, hvat fer at henda í framtíðini, sigur Anders Fogh Rasmussen.

Sum vera man fingu bæði forsætisráðharrin og frú hópin av gávum í Føroyum. Anne-Mette Rasmussen fekk frá Tvøroyar kommunu alt silvurið til tey føroysku klæðini.

Tað síðsta á skránni, áðrenn tey settu seg í bussin til flogvøllin var at velja eina nýggja troyggju frá Sirri til forsætisráðharran.

Ikki er greitt, nær forsætisráðharrin og frú koma aftur til landið. Á hesum sinni var talan um eina almenna vitjan, og føroyingar fara mestur heldur at síggja Anders Fogh Rasmussen á einari styttri arbeiðsvitjan fyrst av øllum einaferð í framtíðini.



*Tey passaðu væl í Føroyum, Anne-Mette og Anders Fogh Rasmussen. Her hjálpir Anne-Metta Anders við at finna tí røttu troyggjuna*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Anders Fogh Rasmussen:

# – Takið tit støðu til flogvøllin

**Danski forsætisráðharrin gevur føroyingum møguleikan at yvirtaka flogvøllin sum hann stendur. Verða íløgur gjørdar, so fer hetta at kosta føroyingum í einari møguligar yvirtøku**

SAMRØÐA
*Heri á Rógvi*



*Eg haldi, nú tit at seta fokus á yvirtøkur og íløgur í flogvøllin, at tit eiga at taka eina greiðu støðu til, um tit vilja ella ikki vilja yvirtaka flogvøllin, sigur Anders Fogh Rasmussen í samrøðu við Sosialin*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

Tónin og høvuðs boðskapurin er tann sami sum áður hjá Anders Fogh Rasmussen. Føroyingar skulu sjálvir gera av, hvat hendir og ikki við møguligum yvirtøkum í Føroyum.

Vilja føroyingar úr ríkisfelagsskapinum, so er hetta upp til føroyingar sjálvar, ljóðar tað frá forsætisráðharranum.

Nýggja felags fráboðanin hjá løgmanni og Anders Fogh Rasmussen savnar eina røð av yvirtøkum undir einari lóg – men innanfyri ríkisfelagsskapin.

### Takið støðu

Ein møgulig yvirtøku er flogvøllurin í Vágum. Sum er eiga danir flogvøllin umvegis Statens Luftfartsvæen.

Fyri stuttum var sokallaða Føroya nevndin á Fólkatingi á vitjan í økinum hjá nevndini. Tá søgdu Aage Frandsen frá Socialistisk Folkeparti og Søren Søndergaard frá Enhedslisten, at tað var skyldan hjá dønum at hava ordan í sínum tingum í Føroyum, og hetta merkir eisini flogvøllurin. Er tað neyðugt at gera íløgur, so er tað júst tað, ið danir eiga at syrgja fyri, soleiðis at flogvøllurin kann virka eftir nútímans treytum uttan undantak.

Men hesum er Anders Fogh Rasmussen ikki heilt samdur við andstøðulimirnar í.

– Teir báðar eru jú kendir fyri ikki at kenna politiska ábyrgd. Tað er jú lætt hjá teimum at koma til Føroya og siga tílíkt – teir skulu ikki gjalda, sigur Anders Fogh Rasmussen.

*Hvat fer so at henda við flogvøllinum í Vágum?*

– Eg havi givið landsstýrinum eitt gott tilboð: Landsstýrið kann yvirtaka flogvøllin fyri einki, soleiðis sum hann stendur nú.

Skal danski staturin hinvegin ígongd við at gera íløgur í flogvøllin. So meti eg, at landsstýrið noyðist at gjalda fyri at yvirtaka flogvøllin.

Tískil haldi eg, at føroyingar eru best tæntir við at yvitaka flogvøllin nú – og so sjálvir gera tær neyðugu íløgurnar, sigur Anders Fogh Rasmussen.

Sostatt ger danski forsætisráðharrin púra greitt, hvør støðan hjá honum til flogvøllin er.

*Flogvøllurin er donsk ogn – eins og so nógv annað í Føroyum. Er tað ikki skyldan hjá danska statinum at hava skil í sínum tingum í Føroyum?*

Jú, tað er rætt. Tí er tað týdningarmesta eisini, at føroyingar taka eina støðu til, hvørt tit ynskja at yvirtaka flogvøllin ella ikki.

Vilja føroyingar ikki yvirtaka flogvøllin, so mugu vit taka støðu til, hvat er neyðugt at gera við flogvøllin, sigur Anders Fogh Rasmussen.

Forsætisráðharrin er ikki í iva um, at tilboðið um at yvirtaka flogvøllin fyri einki, er eitt gott tilboð, og hann heldur føroyingar eiga at umhugsa, um ikki hetta hevði verið ein gongd leið.

Løgmaður og forsætisráðharrin hava prátað um hetta. Men einki evstamark er sett.

– Eg haldi, nú tit at seta fokus á yvirtøkur og íløgur í flogvøllin, at tit eiga at taka eina greiðu støðu til, um tit vilja ella ikki vilja yvirtaka flogvøllin, sigur Anders Fogh Rasmussen.

### Bólturin hjá okkum

Síðani skjótt tvey ár sum forsætisráðharrin hevur Føroya politikkurin hjá Anders Fogh Rasmussen og stjórn hansara verið óbroyttur. Og tað sama er galdandi nú.

Bólturin liggur hjá tykkum, ger Anders Fogh Rasmussen greitt. Og hetta tykjast eisini føroysku myndugleikar at vera á einum máli.

Fyri Anders Fogh Rasmussen er ríkisfelagsskapurin ein felagsskapur millum trý lond við eins rættindum.

– Sum støðan er, so avgera tit sjálvi ferðina á yvirtøkuna – innanfyri ríkisfelagsskapin. Støðan er greið, og nú fáa vit í Danmark at síggja, hvat tit fara at gera, sigur ein avkláraður Anders Fogh Rasmussen at enda.



# Ordans bakkaluarar á Setrinum

**Fyrstu føroysku stjórnmálafrøðingarnir fingu handað prógv á Setrinum fríggjadagin. Dagurin var sannur hátíðardagur, og Føroyar eru vorðnar eina týdningarmikla útbúgving ríkari, helt ein ein nýklaktur stjórnmálafrøðingur fyri. Útbúgvingin hevur ført til eitt nýtt samstarv á Setrinum, har uttansetursfólk leggja leiðina fram við at undirvísa**

ÚTBÚGVING
*Ingi Rasmussen*



*Átta nýggir stjórnmálafrøðingar. Frá vinstru: Sólfinn Hansen, Anna Eikholm Joensen, Fríði B. Nielsen, Anna P. Leo Olsen, Beinir Guðjónsson, Rúni Rasmussen, Oyvindur av Skarði og Hildur Eyðunsdóttir.*

*Mynd: Jens K. Vang*

Tað var hátíðardámur fríggjadagin á Gamla bókasavni á Debesartrøð, har Fróðskaparsetrið nú heldur til. Fyrstu føroysku stjórnmálafrøðingarnir fingu prógv handað, og tað er ein stórur dagur.

– Hetta kann metast sum ein av varðunum í søguni hjá Fróðskaparsetrinum og Føroya landi. Hetta er ein partur av at byggja land og gera Føroyar eitt sindur størri, segði Jóan Pauli Joensen, fyrrverandi rektari og núverandi leiðari fyri Søgu- og samfelagsdeildina á Setrinum.

Har vóru ongi kappar ella hattar á nýklaktu stjórnmálafrøðingunum, men Jóan Pauli Joensen bað hinvegin fólk um at gáa eftir, hvar tey stóðu. Í grótbygninginum, sum var eitt megnartak í 30-árunum. Har høvdu nógv fólk gingið millum ár og dag, og hann helt fyri, at onkustaðni sita Chr. Matras, Janus Djurhuus og onnur smílast og fegnast um tað, sum er hent.

### Bakkalaurusar

Nógv fólk vóru møtt at uppliva stóru løtuna, tá átta fólk fingu prógv handað. Nú ein nýggj útbúgving hevur sæð dagsins ljós á føroyska universitetinum, hava tey í trý ár verið royndarfólk.

Spurningurin var havdur á lofti, hvussu nýggja barnið hjá Setrinum skal eita. Tá farið varð í gongd fyri trimum árum síðan, vóru fólk varin, og kallaðu tað eitt ársnám, sum so líðandi kundi stykkjast saman til eina útbúgving. Men tey lesandi løgdu trýst á, og tað endaði við, at eldsálirnar á Setrinum gjøgnumførdi fyrstu útbúgvingina saman við ágrýtnu næmingunum. Næmingarnir kunnu nú seta fýra bókstavir við sítt navn. B.S.Sc. í stjórnmálafrøði. Skal tað vera heilt fínt, kunnu tey siga »baccalaureus socialis scientarium«. Jógvan Mørkøre, sum er adjunktur í stjórnmálafrøði, kundi ikki lata vera við at hugsa um bakkaluarar, sum er ein beint frammaná, og um so er, so er talan um ein ordans bakkaluara frá Setrinum til okkum øll.

### Trilvandi byrjan

Byrjanin var kortini trilvandi, viðgekk Jógvan Mørkøre. Trupulleikar vóru við hølum og lærarakreftum. Næmingarnir hava ferðast millum Søgu- og samfelagsdeildina, Reynshúsini og Sjómansskúlan. Lærararnir vóru ov fáir, men tað eydnaðist at fáa góðar uttanseturskreftir at taka eitt dyggiligt tak. Og tað gekk.

– Eitt gott samstarv er komið í lag við fólk uttan fyri Setrið, sum hava lagt nógv í hesa útbúgvingina. Vit vænta okkum nógv av samstarvinum frameftir, sum byrjaði við hesari útbúgvingini, og vónandi heldur tað fram, segði Jógvan Mørkøre, sum takkaði m.a. Gesti Hovgaard, Hans Andrias Sølvará og Herluf Sigvaldsson fyri teirra ágrýtni.

Stjórnmálafrøðingar hava í høvuðsheitum verið umvegis tríggjar lærugreinar: Føroyskan politikk, altjóða politikk og løgfrøði. Sambært Jógvan Mørkøre viðger stjórnmálafrøði bæði, hvat politikkur eigur at vera, og hvat hann í roynd og veru er. Øðrumegin verður tað góða samfelagið viðgjørt. Hinumegin verður viðgjørt, hvussu samfelagið í veruleikanum sær út. Millum annað verður hugt eftir, hvør hevur vald, og hvør átti at havt vald.

### Lætta um tilgongd

Malan Marnersdóttir, rektari, handaði prógvini. Hon viðgongur, at Fróðskaparsetrið ikki kundi erpa sær av umstøðunum, sum tey hava bjóðað teimum fyrstu lesandi til stjórnmálafrøði, tí tey hava verið víða. Men næstu árini hevur Setrið so leigað høli á Sjómansskúlanum, sum tey ráða yvir.

Víða hava tey eisini verið reint fakliga, segði rektarin. Tey hava viðgjørt viðurskifti, sum hvønn dag eru at hoyra í tíðindunum. Kommunusamanlegging, arbeiðsloysisskipan, valdsbýti í samfelagnum og nýggja politiska og vinnuliga elitan, eru millum evnini, sum hava verið viðgjørd í ritgerðunum.

Nú tey fara undir víðari lesnað, hava tey fingið eitt gott prógv frá Setrinum.

– Hetta er ikki bara fyrstu ferð, vit handa stjórnmálafrøðingum prógv. Hetta er eisini fyrstu ferð við handa eitt sonevnt Diploma Supplementum, sum er eitt ískoyti til prógvið. Tað lýsir føroysku skipanina og útbúgvingina. Hetta verður gjørt fyri at lætta um góðskrivingartilgongdina, tá farið verður út í heim á aðrar lærustovnar, segði Malan Marnersdóttir.

### Føroyar ríkari

Oyvindur Brimnes er ein teirra, sum hevur fingið prógv. Hann heldur tað hava verið trý spennandi og strævin ár, har tað eisini onkuntíð hevur verið ørkymlandi at vera royndarhara. Men tað góða vigaði meira enn tað ringa.

– Vit hava havt stóra gleði av nærleikanum á einum so lítlum fakulteti. Lærarar hava stórt rós uppiborið fyri at hava loftað okkum hóast smáar umstøður og fyri at hava givið okkum eina fullgóða útbúgving, segði Oyvindur Brimnes vegna tey lesandi.

Útbúgvig er ein tann besta íløgan, sum eitt land ger, helt Oyvindur fyri, og hevði hug at fílast á tær umstøðurnar, sum Fróðskaparsetrið fær frá landinum. Samanborið við aðrar smátjóðir eru tær 16 milliónir krónurnar, sum Setrið fær játtað í ár, lítið av miklum. Men við góðum vilja frá politikarum og vinnulívi átti at verið gjørligt at hækkað støðið skjótt í Føroyum.

Nú eru Føroyar so eina týdningarmikla útbúgving ríkari, endaði Oyvindur Brimnes, tá prógvini vóru handað.



*Føroyar eru ein týdningarmikla útbúgving ríkari, segði Oyvindur Brimnes (vm), sum fríggjadagin fekk BA-prógv í stjórnmálafrøði*

*Mynd: Jens K. Vang*